gult cyan magenta svart



# Flogbótlskapping hjá yngru liðunum

**Hetta vikuskiftið dystaðust hópur av flogbóltsliðum í stórari kapping á Giljanesi**

FLOGBÓLTUR

Flogbóltsfelagið DRÀTT-UR hevur skipað fyri flogbóltskapping fyri yngri lið hetta vikuskifti. 79 lið luttóku. Henda kappingin er síðsta steypakappingin av trimum, sum eru í hvørjum kappingarár, og nú er bert eftir at finna FM vinnarnar.

FM kappingin fyri yngri lið verð í Havn 1. apríl. Gentur og dreingir spældu í 10 deildum sum eru Mans- og kvinnuunglingar, gentur og dreingir 16, gentur og dreingir 14, gentur og dreingir 12 og gentur og dreingir 9.

Úrslitið hetta vikuskiftið gjørdist, at SÌ vann 4 kappingar, Fleyr 2 kappingar, meðan Mjølnir, TB, Dráttur og KÌF vunni 1 kapping hvør. Myndir av vinnandi liðunum síggjast eisini á hesum síðum

Fyri einstøku bólkarnar var úrslitið hetta:

**Gentur 9**
1 Fleyr
2 Nøvan
3 KÍF

**Dreingir 9**
1 SÍ
2 Fleyr

**Gentur 12**
1 Mjølnir
2 SÍ
3 Dráttur

**Dreingir 12**
1 SÍ
2 Fleyr
3 Mjølnir

**Gentur 14**
1 TBa
2 SÍa
3 TBb

**Dreingir 14**
1 SÍ
2 Mjølnir
3 TB

**Gentur 16**
1 Dráttur
2 KÍF
3 SÍ

**Dreingir 16**
1 SÍa
2 Fleyr
3 ÍF

**Kvinnuunglingar**
1 KÍF
2 Dráttur
3 Fleyr

**Mansunglingar**
1 Fleyr
2 SÍ
3 ÍF



*Gentur 9 ár*



*Dreingir 9 ár*



*Gentur 12 ár*



*Dreingir 12 ár*



*Gentur 14 ár*



*Dreingir 14 ár*



*Gentur 16 ár*



*Dreingir 16 ár*



*Kvinnuunglingar*



*Mansunglingar*

gult cyan magenta svart



Dráttur– TB 3–0, (25–15, 25–22 og 25–20)

# Dráttur vinnur framvegis

**Aftur hesa ferð fekk Dráttur ein trý null sigur. Hesa ferð tað TB, sum var mótstøðuliðið**

FLOGBÓLTUR, MEISTARADEILD KVINNUR

Dráttur og Mjølnir liggja framvegis púra jøvn á stigatalvuni, men tó er Dráttur enn hetta eina altavgerandi settið framman fyri Mjølnir, so framvegis eru tað vágagenturnar, sum kunnu avgera hvar FM-heitið endar í ár.

Sunnudagin megnaði TB at koma vestur í Vágar, eftir ikki minni enn tríggjar royndir, tí koyrilíkindini vóru so vánalig, og vegurin var stongdur.

Men tær komu fram, men megnaðu ikki at endurtaka orðini: “tær komu, tær sóu og tær sigraðu”, tí so góður var blíðskapurin í Vágum ikki.

Dráttur, sum í løtuni hevur munin til Mjølnir við einum setti, kom eisini best frá byrjan í dystinum, og vann uttan trupulleikar fyrsta settið 25-15.

Ein tann besti leikarin hetta settið var Dráttur-leikarin Herborg á Mýrini, sum loysti uppgávuna sera væl.

## TB sum eitt lið

Men so kom vend í. TB fór brádliga at leika sum eitt lið, so onkur gullkorn man venjarin Virgar Djurhuus hava sagt í steðginum millum settini. TB legði seg á odda og førdi alt settið, og tað sást tíðiliga, at Dráttur-leikararnir sóðu gullheiðursmerkini glíða spakuliga av hálsinum.

TB leikti hetta settið sum ein væl samansjóðað eind, og tær vóru t.d. ikki at kenna aftur frá dystinum seinasta vikuskifti, tá tær vóru avsmurdar av Mjølni. Og serliga var tað TB-leikarin Annemie, sum við sínum góðu servu, legði mun millum liðini.

Men eins og í steypafinaluni, so kom Dráttur afturíaftur. Og hesaferð kláraðu tær at halda fast. Við endan av settinum komu tær upp á javnleik, og megnaðu eisini at vinna settið 25-22. Og gullið nærkaðist aftur.

## Eisini vandi á ferð í triðja

Og aftur í triðja settið gjørdi TB ein vørr. Tær løgdu seg framum, men kláraðu ikki at halda fast. Dráttur hevði sett sær sum mál at vinna, og við m.a. góðum álopsspæli frá Marinu Popovich, vunnu tær triðja settið 25-20, og harvið dystin 3-0, og enn eitt stig nærri FM-heitinum.

Dráttur hevur nú bert tveir dystir eftir at leika, og teir eru ímóti Fleyr í Havn 11. mars og heima ímóti Fossánesi 17. mars. Ein uppgáva sum tær eiga at megna.

Sum nevnt omanfyri, leikti TB-liðið sum ein eind hetta settið, og eingin skal takast burtur úr, men ein skal tó nevna tær góðu servurnar hjá Annemie, sum góvu Drátti stórar trupulleikar.

Hjá Drátti vóru bestu leikararnir Herborg á Mýrini og Marina Popovich, sum leikti væl frammi við netið, men sum hevði ein vánaligan dag í verjuni. Harafturímóti leikti Helga Nordendal betri i verjuni sunnudagin, enn frammi við netið.

Men samanumtikið ein uppiborðin sigur til vágaliðið.

ÍF–Mjølnir 0–3(13–25, 16–25, 17–25)

# Mjølnir ger skyldu sína

**Mjølnir eru framvegis noyddar at vinna øll settini, og so bert vóhna, at Dráttur missir onku staðni á vegnum**

FLOGBÓLTUR, MEISTARADEILD KVINNUR

Mjølnir leggur framvegis stórt trýst á Drátt. Hesi liðini eru í serflokki í meistaradeildini hjá kvinnum, og kappingin millum tey er hørð. Liðini hava ongar dystir eftir hvørt ímóti øðrum, men allir aðrir dystir skulu vinnast 3-0, tí liðini eru púra jøvn í settum. Fyrimunurin hjá Drátti er, at tær í innanhýsis dystunum við Mjølnir hava vunnið 10 sett, men Mjølnir hevur bara vunnið 9. Tað kann gerast endaligi munurin. So tætt hevur tað ongantíð verið fyrr.



*Kvinnurnar hjá Mjølni vunnu aftur 3-0, men spurningurin er, um hetta er nóg mikið til at røkka teimum hjá Drátti*

Mjølnir og ÍF spældu dyst fríggjadagin á Kambsdali, og kravið til Mjølnir var, at dysturin skuldi vinnast 3-0. Tað megnaði Mjølnir eisini. ÍF hevði í tveimum teimum fyrstu settunum stórar trupulleikar við at fáa spælið at ganga. Leikararnir gjørdu nógvar villur, og móttøkurnar vóru alt ov vánaligar. Mjølnir legði trýst á við hørðum servum, sum ÍF ikki megnaði at gera nakað við. Samanspælið millum Marjuna Kalsø og Tinu Jacobsen í Mjølni virkaði av besta slag, men annars gjørdi Mjølnir ikki so nógv burturúr, tað var ikki neyðugt.

Í 3. setti gjørdi ÍF eitt stutt skifti ein vørr. Tær vunnu seg nøkur stig frá Mjølni fyrst í settinum og vóru frammanfyri 13-10. Móttøkurnar lógu í hesum settinum nógv betur og tað hevði við sær, at Helen á Lakjuni á miðjuni í ÍF kom við í spælið, og hennara skjótu smash góvu Mjølni trupulleikar. Men tað var ikki nógv mikið, tí Mjølnir hevur nógvar streingir at spæla á, og skjótt var eisini hetta settið vunnið. Sostatt lá trýstið aftur á Drátti, sum sunnudagin skuldi vinna 3-0 á TB.

## Støðan, meistaradeild kvinnur

| Lið | Dystir leiktir | vunnir | taptir | Sett vunnin | tapt | munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dráttur | 18 | 16 | 2 | 52 | 13 | 39 | 23 |
| Mjølnir | 18 | 16 | 2 | 51 | 12 | 39 | 23 |
| ÍF | 17 | 7 | 10 | 24 | 36 | -12 | 11 |
| TB | 18 | 7 | 11 | 33 | 34 | -1 | 10 |
| Fleyr | 17 | 6 | 11 | 21 | 39 | -18 | 7 |
| Fossánes | 18 | 1 | 17 | 5 | 52 | -47 | 2 |

## Støðan, meistaradeild menn

| Støðan Lið | Dystir leiktir | vunnir | taptir | Sett vunnin | tapt | munur | * Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| ÍF | 13 | 10 | 3 | 33 | 17 | 16 | 15 |
| Fram | 14 | 8 | 6 | 32 | 25 | 7 | 12 |
| Mjølnir | 13 | 9 | 4 | 33 | 18 | 15 | 11 |
| Fleyr | 13 | 6 | 7 | 22 | 24 | -2 | 8 |
| SÍ | 13 | 0 | 13 | 3 | 39 | -36 | 0 |

Allir (báðir) dystirnir í meistaradeild hjá monnum vóru avlýstir, eins og ÍF-Fleyr í MK)


**Skrivstovufólk**

Til skrivstovu okkara í Kollafirði verður søkt eftir fólki við skrivstovuútbúgving at byrja skjótast til ber.

Umsøkjarar við kunnleika til Navision Financials, Microsoft Excel og Word hava fyrimun. Vit rokna við, at tú ert ágrýtin og áhugað/ur í at náa góð úrslit.

Arbeiðið umfatar m.a.:
- Røkt av ognarum og skuldarum
- Annað vanligt bókhaldsarbeiði
- Samskifti við peningastovnar

Av tí at tú kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við roknskaparleiðara, skrivstovufólk og annars allar partar av Vestlax samtakinum er av týdningi, at tú ert fyrikomandi og leggur dent á samstarvið.

Vit takast við at ala laks og síl, hagreiða, góðska og marknaðarføra somu úrdráttir á evropeiska eins væl og á amerikanska meginlandinum og í Fjareystri.

Tá bygnaðurin í felagnum er soleiðis háttaður, er møguleiki fyri at fáa innlit í og hollan kunnleika um, hvussu eitt framkomið virki er samansett. Ein góður førningur til at byggja eina víðari útbúgving á.

Hevur tú hug og áræði til eitt spennandi arbeiðspláss, set so nakrar reglur saman um teg sjálva(n) og send okkum tær saman við prógvum og viðmælum í seinasta lagi 15. mars 2001.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Tóka Højgaard ella Niels Dann West, tel 42 16 91.

VESTSALMON

**P/F Vestsalmon · Postboks 82 · 410 Kollafjørður · Att: Tóki Højgaard**

*P/F Vestsalmon er partur av Vestlax samtakinum. Virkið hagreiðir umleið 15.000 tons av alifiski árliga og her arbeiða umleið 80 fólk. Vestlax samtakið samstarvar við Pan Fish ASA. Í Føroyum eru umleið 180 fólk í arbeiði. - Vestsalmon framleiðir eftir góðskuskipanini ISO 9000 / HACCP og selur alifisk serliga til marknaðin í Evropa, USA og Asia.*